## Tvey vágalið í bestu deildini

**Fyri fyrstu ferð nakran tíð er Fleyr ikki umboðað, tá besta flogbóltsdeildin byrjar aftur í heyst**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seks meistaraheiti í kvinnuflogbólti eru partur av arkivinum hjá Fleyr í Havn, men tað verður so í øllum førum ikki komandi ár, at hetta talið verður økt.

Fleyr hevur ikki staðið seg nakað serliga væl hesi seinnu árini, og í vetur hava úrslitini verið út av lagi vánalig.

Hetta hevur givið úrslit í einum botnsessi í deildini, og tí noyddust tær út í ein avgernadi dyst um møguleikan at spæla í fremstu røð komandi kappingarár.

Her var mótstøðuliðið SÍ, sum ongan tíð áður hevur verið í bestu deildini, men tað sleppa tær so at royna í heyst.

SÍ vann nevnliga dystin 3-1. Settúrslitini vóru 25-23, 23-25, 25-23, 25-21), og við hesum hevur Vágoyggin altso tvey lið í bestu kvinnudeildin í flogbólti komandi kappingarár. Havnin hevur hinvegin einki, um KÍF ikki verður roknað uppí.

# VÍF spælir fyri møguleikanum

*Strandingar hava ofta argað VÍF seinnu árini, men týskvøldið hava vestmenningar ikki ráð til slíkt, skulu teir framvegis hava møguleikan at gerast meistarar*



**Vestmenningar hava framvegis møguleikan at gera av, hvør skal verða føroyameistari, men áðrenn nakað brak í Havn er á skránni, skulu tvey stig fáast til høldar móti StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður ikki sama oddabrakið hesaferð, tá VÍF í sínum seinasta heimadysti hetta kapppingarárið tekur ímóti StÍF, sum framvegis er føroyameistari, hóast hetta heitið nú bert er til láns.

Strandingar hava nevnliga langt síðani útspælt sín leiklut í FM-stríðnum, men tað hava vestmenninganrir hinvegin ikki. Teir kunnu við tveimum sigrum í teimum báðum seinastu dystunum nevnliga sjálvir gera av, hvar gullið skal plaserast, og tað er einki at ivast í, at tað er hesum møguleikanum, sum teir nú spæla fyri.

Fyrsta forðingin er altso í kvøld, tá strandingar vitja. Júst somu strandingar, sum so ofta áður hava sett kílar í hjá VÍF, og spurningurin er so, hvørt hetta hendir einaferð enn, ella um StÍF mentalt hevur koblað úr fyri árið. Nakað sum ábendingar vóru um seinasta vikuskiftið, tá teir máttu lúta fyri H71.

Hondbóltskvøldið byrjar tó longu klokkan 18.30, tá kvinnuliðini hjá somu feløgunum skulu takast. Her er lítið at ivast í, at VÍF roknar við einum tryggum sigri. VÍF kvinnurnar fáa so undir øllum umstøðum bronsumerki fyri avrikið í ár, meðan StÍF hinvegin ikki røkkur nøkrum, eftir at tær annars fingu bronsumerkini handað eftir seinasta dystin í Vestmanna í fjør.

Dómarar í báðum dystunum verða Hannis & Uni Wardum.

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 11 | 1 | 10 | 6 |
| 2 KÍ | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 NSÍ | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 4 FSV | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 12 | -11 | 0 |

**Bólkur 2**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 1 | 4 | 6 |
| 2 ÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 3 |
| 3 TB | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 1 |
| 4 B68 | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 1 |

**Bólkur 3**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 4 | 2 | 2 | 6 |
| 2 VB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 3 EB/S | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 4 | 0 | 3 |
| 4 Skála | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 23 | 14 | - | 6 | - | 3 | 49 | 26 | 23 | 48 |
| 2 Brøndby (S) | 23 | 14 | - | 5 | - | 4 | 36 | 21 | 15 | 47 |
| 3 FCK (M) | 23 | 13 | - | 6 | - | 4 | 35 | 19 | 16 | 45 |
| 4 OB | 23 | 13 | - | 5 | - | 5 | 49 | 31 | 18 | 44 |
| 5 AaB | 23 | 10 | - | 7 | - | 6 | 34 | 28 | 6 | 37 |
| 6 FCM | 23 | 8 | - | 5 | - | 10 | 42 | 37 | 5 | 29 |
| 7 Viborg | 23 | 7 | - | 7 | - | 9 | 32 | 31 | 1 | 28 |
| 8 AGF | 23 | 8 | - | 3 | - | 12 | 34 | 46 | -12 | 27 |
| 9 Herfølge | 23 | 7 | - | 5 | - | 11 | 24 | 30 | -6 | 26 |
| 10 FC Nordsj. | 23 | 5 | - | 8 | - | 10 | 26 | 38 | -12 | 23 |
| 11 Frem | 23 | 5 | - | 3 | - | 15 | 25 | 44 | -19 | 18 |
| 12 AB | 23 | 3 | - | 2 | - | 18 | 18 | 53 | -35 | 11 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 17 | 14 | - | 1 | - | 2 | 33 | 11 | 22 | 43 |
| 2 Randers FC | 17 | 11 | - | 2 | - | 4 | 43 | 26 | 17 | 35 |
| 3 Silkeborg | 16 | 10 | - | 4 | - | 2 | 35 | 14 | 21 | 34 |
| 4 HFK Sønderj. | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 46 | 21 | 25 | 33 |
| 5 Køge | 17 | 9 | - | 4 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 31 |
| 6 Skjold | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 37 | 31 | 6 | 27 |
| 7 Ølstykke | 16 | 8 | - | 1 | - | 7 | 37 | 31 | 6 | 25 |
| 8 Fredericia | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 24 | 25 | -1 | 24 |
| 9 FC Nordjyll. | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 17 | 20 | -3 | 24 |
| 10 Nykøbing | 16 | 6 | - | 3 | - | 7 | 27 | 28 | -1 | 21 |
| 11 B 93 | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 24 | 29 | -5 | 16 |
| 12 Vejle | 17 | 4 | - | 3 | - | 10 | 24 | 37 | -13 | 15 |
| 13 Fremad Am. | 17 | 3 | - | 5 | - | 9 | 23 | 32 | -9 | 14 |
| 14 Brønshøj | 17 | 4 | - | 2 | - | 11 | 21 | 43 | -22 | 14 |
| 15 FC Aarhus | 17 | 4 | - | 1 | - | 12 | 19 | 43 | -24 | 13 |
| 16 B 1913 | 17 | 1 | - | 4 | - | 12 | 12 | 38 | -26 | 7 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen, Ian Højgaard (Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Næstved | 17 | 11 | - | 3 | - | 3 | 39 | 15 | 24 | 36 |
| 2 Dalum | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 43 | 26 | 17 | 33 |
| 3 Holbæk | 17 | 8 | - | 5 | - | 4 | 31 | 25 | 6 | 29 |
| 4 HIK | 17 | 8 | - | 5 | - | 4 | 33 | 28 | 5 | 29 |
| 5 B1909 | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 35 | 27 | 8 | 27 |
| 6 Slagelse | 17 | 7 | - | 3 | - | 7 | 29 | 26 | 3 | 24 |
| 7 Kolding FC | 17 | 7 | - | 3 | - | 7 | 27 | 28 | -1 | 24 |
| 8 Brabrand | 16 | 6 | - | 5 | - | 5 | 30 | 22 | 8 | 23 |
| 9 Jetsmark | 16 | 6 | - | 5 | - | 5 | 27 | 28 | -1 | 23 |
| 10 Kalundborg | 17 | 6 | - | 4 | - | 7 | 39 | 39 | 0 | 22 |
| 11 Lyngby | 17 | 5 | - | 7 | - | 5 | 29 | 30 | -1 | 22 |
| 12 Glostrup | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 29 | 33 | -4 | 21 |
| 13 Holstebro | 17 | 5 | - | 3 | - | 9 | 28 | 34 | -6 | 18 |
| 14 Skive | 17 | 4 | - | 3 | - | 10 | 31 | 39 | -8 | 15 |
| 15 Hvidovre | 17 | 3 | - | 5 | - | 9 | 20 | 37 | -17 | 14 |
| 16 Hjørring | 17 | 4 | - | 2 | - | 11 | 21 | 54 | -33 | 14 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)



# Ian á besta Vejle liðnum




*Ian Højgaard hevur í vetur vant við besta liðnum hjá Vejle, og um vikuskiftið fekk hann sínar fyrstu minuttir á vøllinum*

**Talan var um svart vikuskifti hjá føroysku feløgunum í næstbestu donsku deildini. Horsens tapti fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, og Fremad Amager og Vejle tap bera við sær, at hesi bæði feløgini eru í stórum vanda fyri at flyta niður**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað skarst í vikuskiftinum illa hjá útisetunum í næstbestu donsku deildini. Vejle, Fremad Amager og Horsens fingu einki burturúr.

Hjá Horsens var talan um fyrsta tapið í hesum kappingarárinum. Johan B. Hansen og liðfelagarnir vóru í Randers. Krúnjydarnir tykjast ætla sær aftur í bestu deildina, har teir ikki hava verið nógvu tey seinastu árini. Frammanfyri 4040 áskoðarum vunnu teir 2–0 á Horsens. Kent Nielsen er venjari hjá Horsens, sum framvegis er átta stig frammanfyri Randers.

Andrew av Fløtum var einasti føroyingurin millum teir fyrstu ellivu á liðnum, tá ið Fremad Amager var í torførum útidysti í Silkeborg. Heimaliðið vann 2–1, men tað var um reppið, at Fremad Amager fekk stig. Teir javnaðu í 94. minutti, men minuttin eftir skoraði heimaliðið í síðsta álopinum yvirhøvur. Málið fingu teir eftir fríspark, sum Jann Ingi Petersen sambært Fremad Amager heimasíðuni var orsøk til.

Jann Ingi Petersen kom á vøllin í 65. minutti, og í 67. minutti loysti Hjalgrím Elttør Andrew av Fløtum av. Fyrra málið fekk Silkeborg, tá ið ein hálvur tími var farin.

Hjá Vejle stendur illa til. Hesa ferð áttu teir heimavøll ímóti Ølstykke, sum fór til hús við 3–1 sigri. Christian Høgni Jacobsen var orsaka av skaða ikki í Vejle hópinum. Tað var Ian Højgaard, sum í 70. minutti fyri fyrstu ferð kom inn á besta Vejle liðið. Hann spældi í álopinum.

Felags fyri Fremad Amager og Vejle er, at bæði liðini eru í stórum vanda fyri at flyta niður. Fremad Amager hevur sama stigatal sum Brøndhøj, ið er á niðurflytingarplássi, og Vejle hevur bara eitt stig meiri enn so.

# OB hevur lagt seg út í DM kappingina

**Tey trý á heiðursmerkjaplássunum mistu øll stig, og nú er OB, sum ikki hevði Jákup á Borg við í Valby, bara eitt stig frá triðja plássinum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Eingin føroyingur var í bestu donsku deildini, tá ið triðja umfarið eftir vetrarsteðgin var á skránni í vikuskiftinum. Todi Jónsson tykist hava ilt við at endurvinna plássið í FCK álopinum, og Jákup á Borg var ikki á fimtan manna OB liðnum, sum sunnudagin var í Valby og spældi ímóti Frem, og sum hevði alla orsøk at vera í heilt góðum hýri, tá ið teir aftur fóru um brúnna um Stórabeltið.

Brøndby var oddalið í vetrarsteðginum, og eftir at tað í tveimum Europa Cup dystum ímóti Barcelona gjørdist álvari hjá teimum, áðrenn tað gjørdi hjá øllum hinum, varð roknað við, at teir heilt skjótt fóru at verða førir fyri at leggja so mikið av sjógvi millum seg og hinar, at spenningurin um meistaraheitið fór at kámast heilt nógv.

Men soleiðis hevur tað ikki gingið. Brøndby hevur ikki enn vunnið síðani vetrarsteðgin. Sunnudagin vóru teir í Farum. Við málleysum javnleiki fingu teir fyrsta stigið í hesum árinum. Fyri Michael Laudrup og hansara menn var talan um stórt vónbrot. FC Nordsjælland stríðist fyri at sleppa undan niðurflytingini. Brøndby svam í málmøguleikum, og tvær ella tríggjar ferðir høvdu teir risa møguleikar fyri at fáa málið, sum hevði givið teimum øll trý stigini og harvið møguleikan at endurvinna oddasessin frá Esbjerg.

Í Aalborg var talan um stóra áskoðarafjøld og intensa og spennandi uppgerð. Einki mál kom undan steðginum. David Nielsen stútaði AaB framum, og Esbjerg javnaði til 1–1 eftir klumpspæl. Málskjútti var Hans Henrik Andreasen, sum við úgjavnandi málinum syrgdi fyri, at Esbjerg framvegis er oddalið.

### FCK vónbrot

Hjá FCK var sunnudagurin stórt vónbrot. Teir vóru risa favorittar í Parkini ímóti Viborg, sum hevur havt afturpartin í vatnskorpuni. Teir flestu av teimum 24.288 áskoðarunum mundu rokna við øðrum enn Viborg sigri. Einki bendi størsta partin av tíðini á annað, enn at heimaliðið skuldi vinna. FCK hevði bóltin nógv størsta partin av tíðini, og Viborg dugdi væl at verja. Men tá ið nýggi FCK liðformaðurin, Bo Svensson, hevði misnýtt brotsspark, lá í luftini, at tað fór at gerast torført hjá FCK.

Sigursmálið hjá Viborg fingu teir, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Peter Møller, sum stutt frammanundan hevði loyst Zuma av, var óheppin, tá ið hann royndi at avlevera við hælinum. Viborg toppskjúttin, Søren Frederiksen, streyk avstað við bóltinum. Svenski FCK málverjin, Magnus Kihlsted, hálvbjargaði, men tað eydnaðist kortini Viborg at fáa mál. Hetta var einasti møguleikin hjá teimum sunnudagin í Parkini!

Eftir dystarlok staðfesti FCK venjarin, Hans Backe, at hansara spælarar høvdu ikki verið nóg avgjørdir, og at stóri trupulleikin hevði verið, at teir ikki megnaðu at sleppa framvið mótstøðumonnunum. Harvið varð fyrsta lítla spurnartekini sett við álopsdygdirnar hjá eitt nú Álvaro, Zuma og Røll, sum annars hava staðið seg framúr væl. Um hetta kann fara at hava við sær, at Todi Jónsson aftur fer at fáa møguleikan, fer tíðin at vísa. Síðani hann kom fyri seg eftir skaðan, hevur tað gingið illa hjá Toda at fáa dystarvenjing.

### OB hóttir

Jákup á Borg fekk ikki boð at vera við í OB ferðalagnum, sum sunnudagin var í Valby. OB vann 3–1 ímóti Frem, sum nú er illa statt. Støðan í steðginum var 1–1. Nógvur vindur var í Keypmannahavn, og í 2. hálvleiki søgdu teir í Frem seg hava verið ikki so lítið órógvaðar.

OB er á fjórða plássinum, men nú er stutt fram til heiðursmerkjaplássini. Tað er eitt stig fram til FCK á triðja plássinum, og tað eru fýra stig fram til Esbjerg, sum er ovast. Í OB hava teir alla tíðina havt sum mál, at teir skulu enda kappingarárið við heiðursmerkjum um hálsin. Nú restar lítið í, at hetta skal gerast til veruleika, og tað verður í Danmark mett sannlíkt, at krónurnar kunnu fara at verða av betri slagi enn bronsu.

Í fjør vildi Brøndby ikki skriva sáttmála við Thomas Lindrup, sum álopsspælarin vildi góðtaka. Tí flutti Lindrup til Brøndby, har hann aftur sunnudagin vísti seg at vera ein av høvuðsmonnunum í OB álopinum.

Síðani vetrarsteðgin hevur OB spælt fýra dystir – tríggjar í landskappingini og ein í steypakappingini, og teir hava vunnið hvørja ferð.

### Høvuðsstaðurin á botni

Í FCK og í Brøndby hava teir neyvan nakað ímóti, at smáu kappingarneytarnir í Keypmannahavn ikki standa seg nakað serligt. Sum nevnt omanfyri so stendur ikki væl til hjá Frem. Og tað stendur uppaftur verri til hjá AB. Teir eru nú so mikið nógv aftastir, at lítil ella eingin vón er um, at teir skulu halda fram í bestu deildini. Leygardagin varð fyrsti dysturin spældur á nýggja stadion hjá FCM í Herning. Heimaliðið vann 6–0 á AB, og Mohamed Zidan, sum áður hevur spælt við AB, var ikki blíður við fyrrverandi liðfelagarnar. Hann skoraði fimm mál!

Fyri AGF var tað stórt vónbrot, at teir noyddust úr Herfølge við 1–0 tapi. Við sigrinum lyfti Herfølge sær burtur frá botninum. Næsta vikuskifti skal FCK til Århus. Einki er at ivast í, at talan verður um torføra uppgávu.